# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Klæmint Weihe, 25 ára starvsdag:

## Móttøka fyri SEV stjóranum



*Í sambandi við 25 ára starvsdagin fekk Klæmint Weihe ein málning av Zacharias Heinesen, sum stýrisformaðurin í SEV, Poul Arni Jacobsen, handaði honum*

**Í sambandi við at Klæmint Weihe, stjóri, hevði 25 ára starvsdag hjá elfelagnum SEV tann 1. januar 2005, var almenn móttøka hjá SEV við Landavegin fríggjadagin 7. januar**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Nógv fólk nýttu høvið at heilsa upp á Klæmint Weihe hendan dagin. Røður vóru hildnar, og sangur og tónleikur var eisini á skránni.

Tey sum hildu røður vóru: Poul Arni Jacobsen, stýrisformaður í SEV, Walther Damgaard frá Ingeniørfirmaet P. A. Pedersen í Keypmannahavn, Kaj Stoumann frá Brønderslev og Oplands Elforsyning og Steen Juul Pedersen, kaðal- og linjumeistari hjá SEV, sum helt eina sera skemtingarsama røðu.

Dupultkvartettin í Ebenezer sang, og Edvard Nyholm Debes og Finnur Hansen framførdu tónleik.

Klæmint er 54 ára gamal og sørvingur. Hann tók realskúlaprógv í 1967, og í 1971 var hann útlærdur radiomekanikari.

Eftir at hann var útbúgvin veikstreymsverkfrøðingur í 1976, arbeiddi hann sum verkfrøðingur í Danmark, áðrenn hann fekk starv sum verkfrøðingur hjá SEV 1. januar 1980. Skrivstovan var tá á Hálsi í Havn.

Klæmint tók við sum fyribilsstjóri á SEV í 1982 og varð settur í fast stjórastarv í 1983.

Í hansara stjóratíð er stovnurin vaksin nógv, og nógvar stórar útbyggingar eru gjørdar kring landið.

Klæmint er eisini kendur frá ymiskum øðrum samanhangum, sum t.d. var hann nevndarlimur í Føroya Banka, Hitafelagnum og Fjarhitafelagnum, og hann var formaður í Vágatunlinum. Í dag er hann formaður í Smyril Line.



*Ketty og Klæmint Weihe*



*Hans Tausen Olsen, umboðsnevndarformaður í SEV og konan, Sólrun*



*Osvald Hansen, fyrrverandi verkmeistari hjá SEV á Sundi, og konan, Eyðleyg*



*Dupultkvartettin í Ebenezer sang undir móttøkuni*



*Óli Hammer, Jógvan Fríðrik Olsen og Meinhard Eliasen*



*Steen Juul Pedersen, kaðal- og linjumaður hjá SEV í Skálabotni, helt eina sera skemtingarsama røðu fyri Klæminti*